











# Frálík hús á Argjum við panoramaútsýni

Frálíku húsini standa væl fyri við sera góðum útsýni inn yvir Havnina og út á fjørðin.

**Fyrsta fatanin**
Tú koyrir niðan til húsini eftir friðarliga vegum í náttúruvøkrum umhvørvi, og tá tú kemur í túnið, kanst tú velja at koyra beint inn í garaguna. Pláss er fyri fleiri bilum uttanfyri. Húsini standa í veðurgóðum, náttúruvøkrum og friðarligum umhvørvi við blindan veg, og garður / urtagarður er uttan um húsini.

**Ljós og luft í umhvørvinum**
Tú kanst anda lættan, tá ið tú kemur niðan í ljósið, tí her er opið fyri, og tú hevur stóran part av Havnini, Nólsoynna og fjørðin framman fyri tær. Fert tú aftur um húsini, hevur tú eitt frálíkt útigólv (terassu), har tú kanst njóta ljósið, sólløturnar og friðin, tí útigólvið vendir beint móti sólini seinnapart og út á kvøldið. Her lívir væl, og omanfyri sært tú beint niðan í hagan. Gøta er niðan á Hamaran, og stutt er til skúla og barnagarð og bussleið. Fert tú omaneftir, gongur tú teg beint í handilin og frálíku bátahavnina á Argjum. Har er lív og hugni.

**Innrætting og standur**
Í neðra er inngongd, durur, hall, wc, vaskirúm / ítrivsrúm við egnari inngongd, kamar og stórt fýrrúm / goymslurúm. Í erva er repos / hall við útgongd til stóra terassu / urtagarð, stova, matarkøkur, strúkirúm / kovi, baðirúm (kar og brús) og 3 kømur. Húsini er dagførd so við og við. Innrættingin er góð, og alt er væl hildið og í góðum standi. Lætt er at koma út í garðin og útigólvið, so tú ert inni hjá tær sjálvum, men samstundis er frítt fyri at hava samband við útiumhvørvið.

**Niðara hædd og garagan**
Beint við síðuna av turru og góðu garaguni, ið kann nýtast til mong endamál, er inngongdin, durur og ein frálík hall at koma inn í, og ein góð trappa er til ovaru hædd. Í niðaru hædd er stórt kamar, men eisini ítrivsrúm / vaskirúm / vásarúm við egnari inngongd, og her eru møguleikar fyri at gera íbúð, um tú ynskir tað.

**Fakta**
Heiðatún 3, Argir
Byggiár: 1982
Hæddir: 2 á 125 fermetrar
Gólvvídd: 250 fermetrar
Kømur: 4
Grundøki: 504 fermetrar
Bilhús: Ja
Prísuppskot: kr. 2.350.000,00

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni